gult16 cyan16 magenta16 svart16



EB-Streymur-B68 1-2 (0-0)

# Tvey brotsspørk í sama minutti

**Niklas á Líðarenda bríksladi innanfyri 60 sekund fyri brotsspørkum í báðum endum. Toftamenn misnýttu, og EB/Streymur fekk mál, men B68 fór avstað við øllum stigunum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Toftamenn høvdu neyvan roknað við, at vitjanin á Mølini á Eiði skuldi bera trý stig við sær, uttan at teir løgdu alla orku í.

Soleiðis tørnaði tað eisini út. B68 vann 2–1, og teir vóru hjartans fegnir, tá Niklas á Líðarenda hevði bríkslað fyri síðstu ferð, og tað var greitt, at kontoin hjá B68 á stoðutalvuni var lívgað við trimum stigum.

– Vit mugu bara siga sum er. Hóast EB/Streymur er ímillum niðastu liðini á stoðutalvuni, so vóru teir okkum sera boysnir. Eg haldi avgjørt ikki, at okkara menn undirmettu teir. Vit roknaðu við, at tað fór at verða torført, og tað var tað eisini. Tað er hugaligt at vinna tøttu dystirnar. Vit hava fingið sjey stig í trimum teimum seinastu dystunum, og tað átti at givið okkara monnum eyka hug at leggja nógv í venjingina og fyrireikingarnar annars, nú vit um tvær vikur fáa vitjan av B36, sum tykist vera sera væl fyri.

Tað er B68 formaðurin, Niclas Davidsen, sum vit tosa við. Hann minnist aftur á 1994, tá B68 spældi javnt á Eiði, og hann fegnast um, at tað hesa ferð royndist betur.

## Gekk javnt á

Serliga í fyrra umfarinum var nógv ferð á. Tað gekk eitt sindur ov skjótt fyri seg í mun til tað, sum førleikin hjá spælarunum megnaði, og tí var tað ikki altíð so rudduligt. Nógvir høgir bóltar vórðu sendir ímillum brotsteigarnar báðar. Tað bar ikki teir stóru málmøguleikarnar við sær, men kortini vóru fleiri hornaspørk.

Rættuliga tíðliga hevði heimaliðið ein heilt stóran møguleika. Jón Sigurd Gleðisheygg tóktist rokna við, at B68 málverjin fór at fáa fatur á høgum innleggi. Men bóltin fór framvið málverjanum, og so tóktist EB/Streyma álopsmaðurin ikki at vera heilt klárur. Í hvussu so er stútaði hann framvið tóma málinum.

## Brotsspørk og mál

Í 2. hálvleiki bríksladi dómarin fyri tveimum brotsspørkum eftir lítlari løtu:

– Eg haldi ikki, at eg nakrantíð áður havi verið við til sovorðið. Fyrst var Mortan Hansen feldur í EB/Streyma brotsteiginum. Øssur Hansen smekkaði brotsparkið í tvørtræið aftanfyri Gunnar á Steig. Bóltin fór út frá, EB/Streymur fór í álop, og so varð brotsspark gjørt ímóti Jón Sigurdi Gleðisheygg. Anghel Sorin var tryggur úr ellivu metrum, greiðir Niklas á Líðarenda frá. Hann hevur verið toppdómari í Føroyum í umleið eina fjórðings øld.

At heimaliðið kom á vinnarakós tóktist seta meiri futt í B68, sum hesa ferð hevði Jan C. Dam á verjukenda miðvallarplássinum, meðan Jan Petersen var í miðverjuni saman við Hans Fróða Hansen.

Álopsparturin varð styrktur, tá Marcello Marcellino avloysti Marlon Jorge, sum hevði verið vongverji í høgru. Síðsta hálva tíman høvdu toftamenn triggjar í álopinum, og teir fingu tvey mál. Hugflogið var ikki nóg ríkt, og EB/Streyma miðverjan við Ólavi Poulsen á odda hevði tað ikki so torført, tá skrábóltar vórðu oystir innfyri málið hjá Gunnari á Steig. Men kortini eydnaðist tað B68 at tiltuska sær tvey mál.

Mortan Hansen var meistari fyri útjavnandi málinum. Nakað úti í brotsteiginum og eitt sindur til vinstru, men kortini mitt fyri, stýrdi hann við høvdinum diagonalbólti frá Arnoldi Joensen úr høgru og í handara síðunetið.

Súni Fríði Johannesen var meistari fyri frísparkingini til sigursmálið. Á EB/Streyma hálvuni vunnu toftamenn bóltin av heimaliðnum, sum harvið ikki var í verjuvanvág. Súni Fríði kundi havt royndt sjálvur ímóti málinum, men hann valdi at spæla uppaftur meiri leysa Marcello Marcellino, sum var nóg kaldur at seta bóltin framvið Gunnari á Steig.

Hjá heimaliðnum kom tað illa við, at Anghel Sorin, sum er ein stórur styrkur at hava fingið hjá EB/Strreymi, noyddist at taka seg aftur, tí hann hevði fingið ein løst.

**EB/Streymur-B68 1-2 (0-0)**

1-0: Anghel Sorin (br.) 56
1-1: Mortan Hansen 71
1-2: "Marcelo" Marcelino 83

Dómari: Niklas á Líðarenda (GÍ)

EB/Streymur: Gunnar á Steig – Alfred Jacobsen, Ólavur Poulsen, Esmar Eiðisgarð – Halldórur Joensen, Jákup Martin Joensen, Knút Vesturtún, Andreas Dahl, Eyðfinn Jensen – Jón Sigurd Gleðisheygg, Anghel Sorin

B68: Magnus E. Poulsen – Marlon Jorge, Hans Fróði Hansen, Jan Petersen, Jákup Eli Olsen – Arnold Joensen, Jan C. Dam, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen – Mortan Hansen, Súni Fríði Johannesen




*Sum tað sæst á myndini, so var rúgvan av innsendum seðlum stór. Bert ein vinnari kundi tó finnast, og er tað seðilin hjá Andrassi, sum sæst á myndini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Andrass vann ferðina

**Vinnari av fótbóltsferðini, sum kappast hevur verið um, gjørdist Andrass Weihe úr Sørvági**

KAPPING
*Jákup Mørk*

Í sambandi við útgávuna av serblaðnuim, fótbóltur 2001, skipaðu Atlantic Airways og Sosialurin fyri kapping, har til bar at vinna eina ferð til Keypmannahavnar til dystin millum FCK og Liverpool.

Hópur av seðlum vóru innkomnir, og høvdu allir hesir til felags, at teir 15 puntarnir, sum tilsamans ímyndaðu maskottin hjá FCK, leyvuna Leo, vóru savnaðir saman. Við at grópa væl niður í bunkan, varð ein av bjálvunum síðani drigin upp, og úrslitið gjørdist, at 15 ára gamli Andrass Joensen úr Sørvági gjørdist hepni vinnarin.

## Tað var gott

Tá vit mánamorgunin ringdu til Andrass at geva honum boðini, var tað ikki tað stóra, sum hann hevði at siga til hetta.

- Tað var gott!.

Somikið fáorðaður var hann at byrja við, men legði síðani afturat, at hann við hesum fekk høvi at vitja sysir sína, sum býr í Odensen, og sum eisini hevði ætlað sær at sæð dystin.

Spurdur, um tað var nøkur serlig orsøk til at hann tók lut í kappingini, segði Andrass, at tað var møguleikin at síggja FCK, sum var tað avgerandi.

- Eg haldi sjálvur við Manchester United, so tað er ikki fyri at síggja Liverpool, sigur hann brosandi.

Sosialurin og Atlantic Airways vilja nýta høvi til at ynskja vinnaranum hjartaliga tillukku við vinninginum, sum vónandi verður orsøk til eina stóra fótbóltsuppliving.

gult17 cyan17 magenta17 svart17



B71-KÍ 1-2 (0-0)

# Marginalarnir við KÍ

**B71 hevði mesta trýstið móti klaksvíkingum, men teir vórðu revsaðir fyri óneyvu atsóknirnar, tá KÍ skoraði tvær ferðir innan seinastu 25 minuttirnar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at byrjanin á kappingarárinum tóktist sera soltin hjá klaksvíkingum, tykjast leikararnir í sigursvanda felagnum nú veruliga at hava fingið ferð á. Sunnudagin gjørdist triði sigurin á rað veruleiki, og hóast tað var vioð tógvið stríð, so munnu stigini smakka eins væl, og tey aloftast gera.

Tað vóru nevnliga sandoyingar, sum í nógv størstan mun myndaðu dystin móti KÍ. Serliga í fyrra hálvleiki royndu teir at leggja stórt trýst á. Teir arbeiddu nógv, og hóast KÍ í útgangsstøði tóktist meira framrættað, so dugdu miðvallararnir hjá heimaliðnum nógv betri at koma framvið, soleiðis at yvirtalsstøður spurdust burturúr.

Talan gjørdist eisini um fleiri heilar og hálvar møguleikar, og hornasparkshagtølini talaðu so avgjørt fyri heimaliðnum, men meira enn tað sama kom tó ikki burturúr.

## Løgdust aftur

Í seinna hálvleiki gekk heldur javnari á. Sandoyingarnir vóru framvegis teir raskaru. Teir vunnu framvegis flestu nærdystirnar, og eftir einum lítlum korteri fingu teir so endiliga løn fyri stríðið.

B71 hevði vunnið sær fríspark í vinstru síðu, og tá Julian Florescu sendi innfyri, var miðverjin, Jógvan Jón Petersen, hægstur, og stútaði bóltin hegnisliga í kassan.

Málið var sjálvandi kærkomið hjá heimaliðnum, men samstundis mundi hetta vera byrjanin til endan fyri teirra viðkomandi. Teir tóku seg nú nakað aftur á vøllin, og tá KÍ samstundis framdi tvær útskiftingar, komu gestirnir alsamt nærri málinum.

Ikki tí, sandoyingar vóru framvegis vandamiklir í mótálopunum, men eins og í fyrra hálvleiki, so tóktist effektivitetur ikki at standa serliga ovarliga á dagsskránni.

Tað gjørdi tað hinvegin hjá KÍ. Burtur sæð frá einum stútari á stongina frá Alexander Djordjevic, høvdu gestirnir ikki havt teir stóru møguleikarnir, men burtur úr ongum fingu teir brádliga javnvág í rokinskapin. Eftir at frísparki varð sent innfyri og stútað útfrá, kom Jan Joensen við fullari ferð og hálvfluktaði bóltin millum vinir og fíggindar, og Waldemar Nowicki kundi lítið annað gera enn at hyggja, meðan bólturin smeyg sær inn um stongina.

Sjálvandi var hetta ein skelkur fyri heimaliðið, og hesin mundi ikki gerast minni, tá KÍ legði seg á odda tíggju minuttir seinni. Uppskriftin var eitt skjótt mótálop, har Hjalgrím Elttør fann ein leysan Fríðin Ziskason. Fríðin trekti inn í brotsteigin, og tá málverjin kom út lyfti miðvallarin hegnisliga í málið til endaliga úrslitið.

Seinastu løtuna royndu teir á heimaliðnum aftur at trýsta, men tá var KÍ komið rættiliga fyri seg, og uttan at nakar annar veruliga stórur møguleiki kom aftur, kundu gestirnir fagnast, tá dómarin hevði bríkslað fyri seinastu ferð.

## Skotvenjing

Klaksvíkingar høvdu eisini alla orsøk til at fagnast hendan dagin. Í góðan tíma voru teir greitt við undirlutan, og teir á Sandi kunnu bert takka sær sjálvum fyri, at teir ikki avgjørdu dystin, meðan teir høvdu møguleikan.

Effektivitetur er tó eisini ein dygd í fótbólti, og ivaleyst man tað koma væl við hjá sandoyarvenjaranum, Kára Reynheim, at tað nú eru tvær vikur til komandi uppgávuna. Higartil hevur spælið hjá liðnum verið á heilt góðari leið og eisini alsamt betri, men fleiri av teimum dystunum hava tó víst, at úrtøkan úr møguleikunum als ikki stendur mát við spælið. Við skotvenjing komandi vikurnar man hetta tó fara at batna, og so er spurningurin, um hetta er nóg mikið, tá teir um tvær vikur vitja HB í Gundadali.



*Hóast útgangsstøðið tóktist verjukent, so megnaðu miðvallararnir hjá B71 sera væl at koma framvið, so yvirtalsstøður kundu skapast*
*Mynd: Emil Simonsen*

**B71-KÍ 1-2 (0-0)**

1-0: Jógvan Jón Petersen 58
1-1: Jan Joensen 68
1-2: Fríðin Ziskason 78

Dómari: Oddmar Andreasen (HB)

B71: Waldemar Nowicki – Bergleif Sólsker, Jógvan Jón Petersen, Bernhard Petersen, Bjørn Thorsteinsson – Hans Jørgen Djurhuus, Julian Florescu, Jón Brekku, Eli Hentze, Kári Nielsen – Høgni Hansen

KÍ: Meinhardt Joensen – Andres Jacobsen, Jan Andreasen, Símun W. Høgnesen – Atli Danielsen, Jan Joensen, Fríðin Ziskason, Harley Bertholdsen – Hjalgrím Elttør, Alexander Djordjevic, Erling Fles

# Landsliðið skinklaði í undanroyndini

**Avrikini hjá teimum átjan landsliðsspælarunum vóru einki serliga sannførandi í vikuskiftinum**

LANDSLIÐSLEIKARAR
*Jóannes Hansen*

Tað eru tveir heimadystir í HM undankappingini á skránni næstu stóru vikuna. Leygarkvøldið verður Sveis á skránni á Svangaskarði, og mikukvøldið í komandi viku verður Jugoslavia á Tórsvølli.

Tí er tað ikki við síðuna av at gera eitt sindur burturúr, hvussu tað í vikuskiftinum hilnaðist hjá teimum átjan spælarunum, sum hósdagin saman við Allani Simonsen og Jógvani Martin Olsen skulu hittast í Runavík, har teir skulu halda til, meðan teir fyrireika seg á Svangaskarði, har gróðurin – eins og alla aðra staðni kring landið – hevur verið sera góður.

Og vit kunnu akkurát tað sama sláa fast beinanvegin: vikuskiftið var einki serligt hjá nógvum av landsliðsmonnunum.

Julian Johnsson var ikki á liðnum hjá Sogndal hósdagin, og Kurt Mørkøre spældi bara tveir minuttir í 2–1 útisigrinum. Teir komu til Føroya longu undan vikuskiftinum.

Óli Johannesen og Hvidovre taptu 2–1 í Vejle. OB tapti 4–0 á heimavølli ímóti AGF, og Johan B. Hansen er framvegis ikki í nánd av besta liðnum hjá OB. Jákup Mikkelsen fekk onga dystarvenjing, tá Herfølge vann í Haderslev.

## Jens Martin besti maður

Tá NSÍ vann 2–1 á heimavølli ímóti HB, vóru fýra landsliðsspælarar á vøllinum, og ein afturat átti at havt verið uppií. Christian Høgni Jacobsen tykist renna kapp við tíðina. Vøddaskaðin, sum tær síðstu vikurnar hevur havt við sær, at álopsmaðurin, sum av álvara gjørdi um seg í Luksemburg og Russlandi, hevur spælt ímillum lítið og einki, ger framvegis um seg, og nú er tað ein spurningur, um tað ber til á landsliðnum at brúka ein mann, sum næstan ikki hevur verið á vøllinum í fleiri vikur.

Á HB liðnum skoraði Uni Arge einasta málið, men annars var hann nógv spakari, enn hann plagar at vera. Jón Rói Jacobsen var ein tann besti HB maðurin, men tað sigur ikki so nógv. Rógvi Jacobsen var lítið eyðsýndur (hann var mesta partin av tíðini á ókenda miðverjuplássinum), og Allan Mørkøre gjørdi ikki góða reklamu fyri sær sjálvum, tá hann fram ímóti dystarenda fekk reyða kortið fyri púra óneyðuga takling. Heilt frammi við hornaflaggið tveitti hann seg eftir bóltinum, sum var á veg út av baklinjuni. Ikki færri enn tveir mótstøðumenn fullu, og bólturin trillaði út av vøllinum til málspark!

Besti landsliðsmaðurin í Runavík sunnudagin var uttan iva Jens Martin Knudsen. Hann hevði ikki so ógvuliga nógv at gera, men hann var sera tryggur, tá tað vóru boð eftir honum.

## Øssur og Hans Fróði óhepnir

Á Mølini á Eiði vitjaðu tríggir landsliðsspælarar. Øssur Hansen lá fyri tað mesta heilt úti í vinstra borði, og hann hevur fleiri ferðir fyrr í ár verið meiri eyðsýndur, enn hann var hesa ferð. Tá B68 fekk brotsspark, varð liðformaðurin settur at skjóta, men hann misnýtti.

Fróði Benjaminsen hevur verið væl fyri higartil í ár, men í fleiri av undanfarnu umførunum hevur hann havt størri leiklut, enn hann hevði á Eiði, har tað serliga í 1. hálvleiki gekk fyri seg í so ovarlaga.

Hans Fróði Hansen vann nógvar luftbóltar, men hann var ikki altíð so heppin. Tá EB/Streymur fekk brotsspark, var tað tí Hans Fróði hevði felt Jón Sigurd Gleðisheygg.

## Helgi áhugaverdur

Á B36 liðnum, sum vann 15–0, fingu Jákup á Borg og John Petersen ikki tað stóru dystarvenjingina. Jákup á Borg, sum í útgangsstøðuni var miðvallari, skoraði bara eitt mál, og tað var upp á brotsspark, sum var gjørt ímóti landsliðsmanninum sjálvum. John Petersen hevur onkuntíð verið meiri málsøkin, enn hann var hesa ferð.

Sámal Joensen og Helgi L. Petersen eru lyklaspælarar á oddaliðnum í Gøtu. Helgi skoraði bæði málini í kærkomna 2–1 sigrinum, og hann má ivaleyst metast sum at vera sera spennandi í landsliðshøpi, nú Todi Jónsson hevur givið avboð, og Christian Høgni Jacobsen tykist hava sera ilt við at koma fyri seg eftir treiska skaðan.